# Mentanarnáttin



**Fríggjakvøldið verður árliga mentanarnáttin í Havn. Veðurlíkindini eru góð og skráin á tremur við fjølbroyttum og lokkandi tiltøkum og tilboðum um allan býin**

**MENTAN**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hesi seinastu árini hevur ólavsøkan rættiliga fingið kapping frá afturvendandi mentanarnáttini, og nógv fólk gleða seg til hetta hugnaliga og minni peningaliga tiltakið.

Á skránni eru somikið nógv tiltøk, at okkurt er til einhvønn tørv, aldursbólk og áhuga.

Vit hittu Ingigerð á Trøðni, leiðara á Kunningarstovuni í Havn, sum hevur samskipað skránna hjá Mentanarnáttini í fleiri ár nú. Hon hevur sjálvandi úr at gera í hesum døgum, nú síðsta hondin verður løgd á fyrireikingarnar.

## Tilboð til borgararnar

Í stuttum kunnu vit siga, at mentanarnáttina eru



## Alment

17-21 Tilhaldið Tórsgøta hevur opið hús. Tilhaldspannukøkur og drekkamuður til keyps. Felagssangur við Simma Jacobsen og Fróða Sandoy kl. 21-22.

18 Gamli Kommunuskúlagarður, Heðin Mortensen, borgarstjóri, setir mentanarnáttina og GHM spælir.

18:30–20 Ráðhúsið – Gróthúsið opið hús

19-23 Westward Ho, Lága kei, hevur opið skip

20–22 Íslendska sendistovan á Kongabrúnni hevur opið hús.

## Túrar



18–22 Opið skip og framsýning umborð á M/S Thorshavn. Stuttur sightseeing túrur útum Havnina kl. 19 og 21. Tekning umborð.

19:15 Felagið Tórshavn bjóðar gongutúr heim eftir Landavegnum. Byrjað verður við Skeivu Brúgv. Leið 1 fer úr Steinatúni kl. 19.13. Kjartan Kristiansen er gonguleiðari.

19–21 Føroya Ferðaleiðarafelag bjóðar gongutúrar við ferðaleiðara: Reynið og Tinganes. Byrjað verður við Kunningarstovuna. Hilda Thomsen greiðir frá. Kongavitjanin 1874: Byrjað verður við Kongaminnið. Sámal Bláhamar greiðir frá.

20+21+22 Rundvísing í gomlu húsunum á Tinganesi. Frá Reynagarði/Egholmshús, í Bakkapakkhúsið, Leigubúðina og endað í Pakkhúsinum hjá Skibsted. Avmarkað atgongd. Bette Johansen vísir runt.

## Útbúgving



Altjóða skrivstovan
J.C.Svaboes gøta 14, opið hús

20-23 Føroya Lærara- og Pedagogskúli á Frælsinum hevur opið hús. Kunnað verður um nýggju bachelor-útbúgvingarnar, sum byrja eftir summarfrítíðina. Ymiskt annað verður á skránni, og kaffi og køkur verða at fáa.

20-23 Vinnuháskúlin, Nóatún, hevur opið hús.

## Trúarlív

18–23 Havnar Kirkja er opin. Tórshavnar Klarinett-orkestur spælir kl. 20.

21 Ebenezer hevur opið hús við sangløtu við Sangkórinum, Ungdómskórinum, Manskórinum og øðrum.



## List



**10–22 Føroya Landsbókasavn, J.C.Svaboes gøta. Myndaframsýning hjá Ole Wich.**

**14-22 Gallerí Stephanssons Hús. Listaframsýning hjá Oggi Lamhauge letur upp.**

**14-23 Smiðjan í Lítluvík. Ruth 100 ár (11. Juni 1908-2008). Modell av Ruth og myndaframsýning.**

**16–23 Leirlist, Varðagøta 1. Skulpturgarðurin er opin.**

**17–22 Listagluggin, Niels Finsens gøta 25, er opin.**

**18-23 Tórshavnar Móttøkuhús og Myndasavn í Tróndargøtu er opið. Høvi verður at síggja listasavnið hjá Tórshavnar kommunu.**

**18:30–22 Snarskivan. Listaframsýning hjá Astrid Andreasen letur upp. Martin Joensen syngur og spælir.**

**20 Listaskálin, Oman Viðarlund. Summarframsýningin 2008 “Kanska – Maybe – Måske” hevur fernisering í Listaskálanum. Framsýningin er eisini í Norðurlandahúsinum.**

**22 Norðurlandahúsið. Fernisering og tónleikur í sambandi við Summarframsýningina 2008. Sneisabitar vera og okkurt at leska sær við.**